# Skeggjar ætla at seta heimsmet

**Svimjifelagið Skeggjar úr Gøtu fara at royna at seta eitt nýtt heimsmet, tá tey í august mánaði fara ein túr til Noregs við Norrønu**

HEIMSMET
*Solby A. Eliasen*

*Tá Norrøna fer til Bergens tann 11. august byrjar tann fyrsti svimjarin at svimja umborð, og steðgað verður ikki aftur, fyrr enn Norrøna leggur at aftur í Havn tann 13. august*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Svimjararnir fara ein túr til Bergens og aftur við Norrønu. Og tey ætla at svimja allan túrin. Tað vil siga, at tað allanvegin til Bergens og aftur til Føroyar verður onkur frá Skeggjum í hylinum og svimur. Hvør svimjari fer at svimja í fimtan minuttir í part, so hava tey frí í fimm tímar og fara síðani útíaftur. Ætlanin er, at tey tó skulu hava frí í tríggjar tímar, meðan skipið liggur úr Bergen, men so verður aftur lagt til brots og svomið aftur, inntil Norrøna leggur at í Havn. Sostatt kemur hvør svimjari at svimja einar tíggju ferðir, áðrenn Norrøna verður aftur á Havnini.

Hetta tiltakið verður fyrst og fremst skipað sum ein stuðulssvimjing, men svimjifelagið hevur sent bræv til Guinnes Book of Records, har tey spyrja seg fyri um at seta heimsmet í at hava svomið longst umborð á einum ferðamannaskipi.

Hetta hava tey ikki endaliga fingið svar upp á enn, men tey vænta, at tey vita tað endaliga tíðliga í augustmánaði. Sjálvur túrurin hjá felagnum verður í døgunum 11. til 13. august.

Hetta við at royna at seta heimsmet, hava tey gjørt fyri at fáa meira umrøðu, og harvið kanska útvega enn fleiri stuðlar. Tí tað er ongin ivi um, at eitt tílíkt tiltak gevur umrøðu, so tað má sigast at verða gott fyri bæði Smyril Line og aðrar stuðlar.

Smyril Line stuðlar felagnum við, at túrurin einans kostar 300 krónur fyri hvønn svimjaran.

# Fólkadansarar vitja oyggjarnar

**Í hesum døgum er ein danskur fólkadansarabólkur í Føroyum. Bólkurin eitur Kontra Otte, og tað er Tóra Samberg Dahl úr Klaksvík, sum hevur tilrættislagt ferðina hjá teimum**

FÓLKADANSUR
*Solby A. Eliasen*

*Danski fólkadansarabólkurin Kontra Otte vitjar í hesum døgum í Føroyum. Tey fara at hava framsýning bæði í Klaksvík og Havn*

Dansararnir, sum eru 20 í tali, komu til landið seint mikukvøldið. Upprunliga skuldi flogfarið seta seg klokkan hálvgum ellivu um morgunin, men tað var nógv seinkað orsakað av toku. Men ferðalagið kom so til Klaksvíkar í øllum góðum um midnáttarleitið mikukvøldið.

Tey skulu verða í Klaksvík til mánadagin, tá leiðin gongur til høvuðsstaðin. Meðan tey eru í Klaksvík, fara tey at vitja ymsastaðni í Norðoyggjum. Millum annað verður ein túrur yvir á Kalsoynna, og tey fara eisini til Viðareiðis.

Leygarmorgunin klokkan hálvgum ellivu fara tey at hava eina dansiframsýning við býráðshúsið í Klaksvík. Tey dansa siðsøguligar dansir, og búnarnir hjá teimum eru sera hugtakandi.

– Búnarnir eru gjørdir eftir tí gamla mynstrinum, og alt er hondgjørt, greiðir ferðaleiðarin, Tóra Samberg Dahl frá.

Tóra hevur tey seinastu 10 til 12 árini verið ferðaleiðari hjá ymsum bólkum, og tíðindini um tílíkt frættast. Tóra og ein limur í hesum dansibólkinum kennast, so hesin heitti á hana um at tilrættislegja teirra túr her í Føroyum.

Sum sagt so verða tey í Klaksvík inntil mánadagin, tá fara tey til Havnar, har tey verða inntil 4. juli, tá leiðin gongur aftur til Danmarkar. Tey fara eisini at hava eina dansiframsýning í Grasagarði í Havn. Júst hvønn dag, tað verður, er ikki heilt greitt, men tað verður so ein av døgunum í komandi viku.

Kontra Otte telur 20 fólk, sum eru í aldrinum 40 til 70. Tey hava dansað saman í eini 25 ár. Tey eru komin higar sum vanlig ferðafólk, men so nýta tey samstundis høvi til at sýna fram teirra áhugaverdu fólkadansir.



## NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Evald Larsen og Føroya-kalendarin




*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fyrsti føroyski kalendarin í litum - Føroya-kalendarin – kom út í 1972. Útgevari var Evald Larsen í Havn, og kalendarin bleiv útgivin til og við 1979. Kalendarin bleiv prentaður á Dimmalætting, har Flemming Samuelsen stóð fyri hesum arbeiði. Litprent var ikki so vanligt tá í tíðini, sum tað er nú. Helge Justinussen stóð fyri hefting og liðugtgerð av kalendaranum. Alt arbeiðið varð sostatt gjørt í Føroyum.

Umframt privatfólk nýttu eisini nógvar fyritøkur Føroya-kalendaran sum heilsanir til teirra vinfólk og kundar. Kalendarin varð væl móttikin og nógv seldur.

Evald Larsen er dani, føddur í 1931 í bygdini Fasterholdt, nærhendis Herning í Miðjútlandi. Sum ungur kom hann í læru hjá Balslev & Goos í Keypmannahavn, ið høvdu dóttirfelagið Balslev & Co. í Føroyum. Tá hann varð útlærdur, fór hann í hertænastu í danska herinum í hálvtannað ár. Í 1954 fekk hann tilboð um starv í kolonialdeildini hjá Balslev & Co. í Havn, sum tá helt til á eystaru bryggju. Eftir at hava arbeitt í Føroyum í umleið eitt ár bleiv hann aftur settur í starv hjá Balslev & Goos í Keypmannahavn. Men tíðin í Føroyum bleiv ikki gloymd og í 1957 fekk Evald aftur starv hjá Balslev & Co. í Havn. 5. mai 1960 giftist hann við Linu, f. Wenningsted Jacobsen, sjónleikarakvinnu, úr Havn. Brúdleypið varð hildið í Havnar Klubba.

Í 1966 søkti P/F Poul Hansen í Havn eftir einum sølumanni. Evald søkti hetta starv og fekk tað. Lina og Evald fluttu so aftur til Føroyar at búgva saman við synunum Erik og Finn. Tá innkeypsstjórin hjá Poul Hansen, Ebbe Mortensen, doyði, yvirtók Evald hansara starv. Hann arbeiddi hjá Poul Hansen til hann fór frá fyri aldur í 1999.

Síðan konfirmatiónsaldur hevur Evald havt fotografering sum fritíðarítriv, og hevur hetta alla tíðina havt hansara stóra áhuga. Fleiri av hansara greinum um fototeknik hava staðið í donskum foto-magasinum, eins og hansara myndir hava staðið seg væl í nógvum fotokappingum. Í 1990 luttók Evald, saman við fotografinum Alan Brockie, í eini foto workshop í Onglandi hjá kenda enska fotografinum Poul Hill og tí ikki minni kenda landslagsfotografinum Fay Godwin. Nú fotografering er vorðin alt meira digitaliserað, tekur Evald ymisk Longu dagin eftir fóru tey til Danmarkar við ferðamannaskipinum Tjaldur og búsettust í eini íbúð í Rødovre.

Evald skeið í elektroniskari myndaviðgerð. Í fjør var hann á einum slíkum skeiði á »Medieskolerne í Viborg« Á henda hátt dagførir hann sína vitan innan fotografering.

Hann hevur eisini gjørt nøkur búmerkir sum t.d. búmerkið hjá P/F Poul Hansen og Havnar Klubba. Umframt tað gjørdi hann lay-aut til plakatina »Færøerne i Fokus«, sum var í Danmark í 1986. Ítróttur hevur eisini hansara stóra áhuga. Sum ungur spældi hann í fótbóltsfelagnum FREM, sum til hansara stóru gleði er flutt upp í SAS-ligaðina aftur. Eisini spældi hann hondbólt í AJAX. Í Føroyum spældi hann í hondbóltsfelagnum Neisanum, og hann gavst sum aktivur spælari, tá teir vunnu føroyameistaraskapin í Old Boys í 1969.

Sum pensionistur hevur Evald nokk at takast við. Hann viðlíkaheldur hús og hava, lesur góðar bøkur, viðgerð myndir í myrkakamari, samstundis sum tær nýggu digitalu myndirnar verða viðgjørdar á telduni. Eisini skulu børn og abbabørn vitjast. Eldri sonurin, Erik, er giftur við Turið Dam Joensen, tey búgva í Hálandi. Yngri sonurin, Finn, og Anna Jórun Heinadóttir búgva í Havn, og tey eiga børnini Fríðgerð og Eli.

*Vørubilaframsýning hjá P/F Wenzel. f.v. Torben Engmark frá FMC, økisstjóri fyri Føroyar,og Petur Petersen, stjóri hjá P/F Wenzel, við einum Ford Transit Connect vørubili sum bleiv kosin »nternational Van of The Year 2003«*

# Ford 100 ár - vørubilaframsýning hjá P/F Wenzel

**Í samband við at Ford Motor Company fyllir 100 ár í ár, verður skipað fyri ymiskum tiltøkum hjá P/F Wenzel í Havn. Mikudagin 25. juni var vørubilaframsýning, har økisstjórin fyri Føroyar svaraði spurningum um vørubilaskránna**

MAGNUS GUNNARSSON
*Bilar*

Mikudagin 25. juni var ein vørubilaframsýning hjá P/F Wenzel í Havn. Endamálið við hesi framsýning var at geva vinnulívsfólki og øðrum áhugaðum høvi at síggja og royna Ford vørubilarnar, Transit, Connect, Fusion og Ranger.

Í hesum sambandi høvdu teir vitjan av Torben Engmark frá FMC Danmark, økisstjóra fyri Føroyar. Torben hevur eisini vørubilar sum sítt serumráði. Í sambandi við at Ford Motor Company bleiv 100 ár tann 16. juni, vóru fleiri jubileumstilboð á skránni, tilboðini verða galdandi alla hesa vikuna. Fleiri stukku inn á gólvið og fingu eitt gott bilprát. Ford hava nú eina vørubilaskrá, sum dekkar ein hvønn tørv hjá vinnulívskundum.

## Dagurin

**27. juni. Sjey sovarar.** Halgisøgan sigur frá, at tá ið keisarin Decius legði eftir teimum kristnu, leitaðu sjey ungir menn sær skjól í einum helli í fjøllunum. Hellið, teir krógvaðu seg í, varð funnið, og stórir steinar settir fyri inngongdina, so at teir skuldu svølta í hel. 200 ella 300 ár seinni vórðu steinarnir av tilvild veltir frá munnanum, og teir sjey vaknaðu við sítt fríska lív uttan at vita, hvussu leingi teir høvdu sovið.